# Sinnissjúkur í Føroyum

*Høgni Djurhuus og August G. Wang*

Tað hevur altíð ljóðað, at talið á sinnissjúkum fólki í Føroyum hevur verið væl hægri enn í Danmørk (1. talva). Tølini á 1. talvu eru yvir øll tey sinnissjúku eitt ávíst tíðarbil (prævalens). J. R. Hübertz hevur funnið fram til tey tølini, hann hevur eftir heimildum frá læknum og øðrum embætismonnum, serliga prestunum. Tølini frá A. Berg og J. Zachariassen og úr Sundhedsstyrelsens årsberetning 1950 eru metingar. R. K. Rasmussen hevur funnið fram tøl fyri alt landið út frá neyvari uppteljing í Eiðis og Vága læknadømi. Eisini aðrir rithøvundar (Strømgren 1976) nevna sama ójavna viðvíkjandi sinnissjúkuni psychosis maniodepressiva. Annars hava fleiri rithøvundar gjørt samanberingar millum talið á sinnissjúkum t. d. í ymsum tíðarskeiðum og ymsum londum (Goldhamer 1953, Helgason 1964). Goldhamer hevur funnið, at í Eysturamerika er talið á nýinnløgdum sinnissjúkum (first admissions) mest sum tað sama gjøgnum umleið 100 ár, tó á okkara døgum heldur fleiri kvinnur og eldri fólk. Helgason hevur funnið, at talið á sinnissjúkum (prævalens) á Íslandi og í Danmørk er tað sama. Á Landssjúkrahúsinum varð seinast í 1960-árunum sett á stovn sálarsjúkudeild, sum varð víðkað til 80 seingjarløg í 1974. Henda deild er tann einasta av sínum slagi í Føroyum, og er tað tí væntandi, at mest sum øll fólk við sinnissjúkum (psykosum) verða innløgd á deildina. Hagtøl deildarinnar styðja ikki omanfyri nevnda um sinnissjúkur í Føroyum, heldur tvørturímóti. Vit hava tí hildið, at tað hevði verið áhugavert at lýsa hetta nærri.

1. talva.

| | Sinnissjúk | Føroyar | Danmørk |
|---|---|---|---|
| J. R. Hübertz .................. | 1839—41 | 2 ‰ | 1 ‰ |
| J. R. Hübertz .................. | 1847 | 3,3 ‰ | 1,5 ‰ |
| A. Berg ........................ | 1862—69 | 3,3 ‰ | |
| J. Zachariasen .................. | 1934 | 5 ‰ | |
| Sundhedsstyrelsens årsberetning .... | 1950 | | 2,5 ‰ |
| R. K. Rasmussen ................ | 1952 | 3,3—5,2 ‰ | |

*Tilfar og kanningarlag.*

Tilfarið er fingið til vega gjøgnum Institut for psykiatrisk demografi í Risskov, Århus. Hesin stovnur savnar saman hagfrøðiligar upplýsingar frá øllum sálarsjúkudeildum í ríkinum. Tey flestu tølini eru fyri frá 1.4.75 til 31.12.77 og lýsa innleggingarnar á sálarsjúkudeildina á Landssjúkrahúsinum fyri seg og allar sálarsjúkudeildir í Danmørk fyri seg. Nøkur tøl hiðani eru tó frá 1.4.70 til 31.12.77. Burtur úr hesum tilfari hava vit tikið teir sjúklingar, sum við fyrstu innlegging hava fingið sjúkuavgerðirnar schizophrenia, psychosis maniodepressiva, psychosis reactiva og ógreiniligar (ikki bólkaðar) psykosur. Soleiðis eru øll sinnissjúk innløgd fyrstu ferð tikin við uttan tey við likamssjúku sum høvuðsorsøk til sinnissjúkuna. Hugsast kann, at sjúkuavgerðarhátturin er ymiskur í Føroyum og Danmørk, soleiðis at hesar nevndu sjúkuavgerðir (diagnosur) eru annarleiðis nýttar her í mun til aðrar sálarsjúkuavgerðir. Men lutfallið millum hesi bæði sløgini av sjúkuavgerðum er tað sama í Føroyum og Danmørk. Lutfallið millum nýinnlagdar sjúklingar við sinnissjúkum og allar nýinnlagdar sjúklingar er fyri Føroyar 1/3,2 og fyri Danmørk 1/3,4. Ein onnur fyritreyt fyri samanbering er, at eins nógv av teimum sinnissjúku verða innløgd í Føroyum og Danmørk á sálarsjúkudeild. Læknaútbúgvingin er tann sama og ávísingarsiðurin tann sami. Eisini er seingjatalið í mun til fólkatalið í tí nevnda tíðarskeiði mest sum tað sama í Føroyum og Danmørk (umleið 2 ‰ av fólkatalinum). Hetta tilfarið er bólkað eftir sjúkuavgerð, aldri og kyni, og síðan viðgjørt.

2. talva. *Nýinnlagdir sjúklingar við sinnissjúkum (uttan har likamssjúka er høvuðsorsøk). Í klombrum talið á øllum nýinnløgdum sjúklingum á sálarsjúkudeildum.*

| | Føroyar | Danmørk |
|---|---|---|
| 1.4.75—31. 3.76 | 18 (49) | 3.285 (11.135) |
| 1.4.76—31.12.76 | 18 (48) | 2.500 ( 8.140) |
| 1.1.77—31.12.77 | 16 (69) | 3.409 (11.886) |
| Saman | 52 (166) | 9.194 (31.161) |

*Úrslit.*

Á 2. talvu síggjast tølini fyri fyrstu ferð innløgd frá 1.4.75 til 31.12.77. Tølini á 2. raði eru bert fyri 9 mánaðir. Um talið úr Danmørk verður umroknað til okkara viðurskifti, skuldu vit havt 75,2 sjúklingar í staðin fyri 52. Um roknað verður talið á nýkomnum sjúklingum í mun til fólkatalið fyri eitt ár (incidensur), fæst fyri Føroyar 0,45 ⁰/₀₀ og fyri Danmørk 0,66 ⁰/₀₀. Tey vísa, at fyri tær umrøddu sinnissjúkurnar eru tølini her lægri enn á donskum sjúkrahúsum, tá ein roknar í mun til fólkatalið (fólkatal frá ársskiftinum 1976/77).

Til nærri útgreining, hvar hesin munur serliga er at finna, halda vit hesi tølini vera ov smá, og hava vit tí úr Føroyum tikið tølini frá 1.4.70 til 31.12.77. Hesi tøl síggjast á 3. talvu. Til samberingar eru útroknað tøl; hesi eru tey, ein kundi væntað, um viðurskiftini her vóru sum í Danmørk. Sum grundarlag undir teimum roknaðu tølunum er tó bert nýtt tíðin frá 1.4.75 til 31.12.77. Hetta meta vit best, tí bert í hesum nevnda tíðarskeiði eru allar danskar sálarsjúkudeildir við í tilfarinum. Talvan vísir, at stórt sæð eru eins nógvar nýkomnar sinnissjúkur millum mannfólk, men skilliga færri her millum konufólk. Viðvíkjandi skizofreni eru tølini kanska ov smá at siga nakað vist, men fyri sjúkurnar psychosis maniodepressiva og psychosis reactiva er munurin skilligur.

Á sama hátt sum tølini á 3. talvu eru bólkað eftir kyni, eru tølini á 4. talvu bólkað eftir aldri. Kvinnurnar eru tiknar fyri seg og bólkaðar í aldursbólkar. Bert kvinnurnar eru tiknar við, tí tað var her, at munurin serliga var at finna Føroya og Dan-

3. talva. *Tølini úr Føroyum frá 1.4.70—31.12.77 bólkað eftir kyni og sjúku. Í klombrum donsk tøl umroknað til okkara viðurskifti.*

| Sjúka | Menn | Kvinnur |
|---|---|---|
| Schizophrenia | 6 (10,4) | 3 ( 7,0) |
| Psychosis maniodepres. | 27 (28,0) | 36 ( 55,5) |
| Psychosis reactiva | 30 ( 34,2 | 39 ( 49,6) |
| Aðrar (ikki bólkaðar) | 13 (10,9) | 10 ( 15,1) |
| Saman | 76 (83,5) | 88 (127,1) |

markar ímillum. Við tað at tølini eru so smá, er farið fram sum omanfyri. Til samanberingar eru útroknað tøl úr tí danska tilfarinum, útroknað sum omanfyri. Tað sæst av hesum, at upp til um 30 ár eru fleiri nýkomin sinnissjúk í Føroyum, men allir eldri aldursbólkar hava lægri tøl enn í Danmørk.

*Umrøða.*

Tølini vísa, mótvegis tí, sum hildið og væntað var, at talið á nýkomnum sinnissjúkum er lægri her enn í Danmørk. Um orsøkina til henda mun, kann ikki enn sigast nakað við vissu. Eru tað veruliga færri sjúk, kann orsøkin neyvan vera broyting í ættarbregði, tí til tað er tíðin ov stutt frá tí, at menn hava funnið øðrvísi úrslit. Hugsast má tí um umhvørvisbroytingar. Undranarvert er tað, at munurin mest sum allur er konufólkum viðvíkjandi. Til at meta um ávísa sjúku eru tølini ov smá. Viðvíkjandi tí skeiva aldursbýtinum er tað at siga, at um ein setur tað í mun til aldursbýtið í fólkinum sum heild her og í Danmørk, verður tað minni skeivt, tí tað eru lutfalsliga fleiri yngri og færri eldri í Føroyum (Folketællingen på Færøerne 1970, Danmarks Statistik). Sjálvt eftir hesa útjavning verður býtið øðrvísi her enn í Danmørk, og sum nevnt samanlagt færri nýkomnir sjúklingar. Skilnaður er millum kanningarnar hjá okkum og tær, sum vórðu nevndar á 1. talvu. Okkara tøl eru bert fyri fyrstu ferð innlagdar sjúklingar og vísa sostatt nýkomnar sjúkur (incidens), meðan hini tølini eru fyri øll tey sjúku í samfelagnum eitt ávíst tíðarbil (prævalens). Tøl okkara eru tí ikki beinleiðis samanberandi við hini, men kunnu hvørt sær

4. talva. *Nýkomnir kvinnuligir sjúklingar í Føroyum frá 1.4.70 til 31.12. 77 bólkaðir eftir aldursbólki. Í klombrum donsk tøl umroknað til okkara viðurskifti.*

| Aldursbólkur | Tal |
|---|---|
| 0—14 | 0 ( 0) |
| 15—29 | 28 ( 21,4) |
| 30—39 | 12 ( 21,1) |
| 40—49 | 12 ( 19,8) |
| 50—59 | 15 ( 24,5) |
| 60—69 | 14 ( 21,5) |
| 70—79 | 5 ( 14,9) |
| 80— | 2 ( 3,9) |
| Saman | 88 (127,1) |

verða samborin við samsvarandi tøl úr øðrum londum (her Danmørk). Tað skal tó viðmerkjast, at tølini hjá R. K. Rasmussen eru gjørd fyri at meta um tørvin á seingjarløgum til sálarsjúk, og tí bert siga hvussu mongum tørvar innlegging.

Incidenskanningar hava tann fyrimun, at møguligar broytingar síggjast skjótari enn við prævalenskanningum (tá talan er um varandi sjúkur). Ikki er full vissa fyri, at incidensur svarar til innløgd fyrstu ferð. Summir rithøvundar halda, at sjúklingar við nýkomnari skizofreni altíð verða innlagdir, men at tað er ikki vist fyri aðrar sinnissjúkur (Bland 1977). Møguleiki er tí fyri, at ikki øll tey sinnissjúku koma á sjúkrahús; tí er tað ein spurningur, um tann ávísti munurin kemur av, at fleiri sinnissjúk ganga heima her enn í Danmørk. Løgið er tað tó, um so skuldi verið, at hetta bert er galdandi fyri kvinnur.

Framhaldandi kanningar í samarbeiði við Institut for psykiatrisk demografi fara møguliga at geva eina greiðari mynd.

Samanumtikið er ávístur møguligur munur, soleiðis at í Føroyum eru færri sinnissjúk. Spurningurin er, hví munurin mest sum bert er millum kvinnurnar oman fyri tríati. Annaðhvørt eru tað færri sum gerast sinnissjúk í Føroyum ella fleiri í Danmark. Sum áður nevnt má ein hugsa sær umhvørvismun. Tær stóru broytingarnar í samfelagnum eru komnar fyrr til Danmarkar, í húskis- og arbeiðsmynstri, serliga kvinnum viðvíkj-

andi. Tann høgi incidensurin hjá yngru kvinnunum her á landi kundi bent á, at tað nú ber at sama borði her.

*Úrtak.*

Ein samanbering er gjørd millum sjúklingar innlagdar fyrstu ferð við sinnissjúkum her og í Danmørk. Mótvegis tí sum vænt-að var, vísir kanningin færri nýkomnar sinnissjúkur her. Mun-urin er at finna millum kvinur eldri enn tríati ár. Umrøtt verður, um hetta er tekin um veruliga færri nýkomnar sinnis-sjúkur. Nærri kanningar verða gjørdar.

Árligur incidensur var fyri tey seinastu árini roknaður til 0,45 ‰ fyri Føroyar og 0,66 ‰ fyri Danmørk.

Siggu Husgaard, skrivara, takka vit fyri at hava maskinskrivað handritið.

## BÓKMENTIR

*Berg, A.:* Bidrag til kundskab om Færøerne. Nykøbing Sjælland 1889.

*Bland, R. C.:* Demographic aspects of functional psychoses in Canada. Acta psychiat. Scand. 55, 369—380, 1977.

Folke- og boligtællingen 16. nov. 1970, Færøerne. Danmarks Statistikk, København 1975.

*Goldhamer, H. & A. W. Marshall:* Psychoses and Civilizations: Two Studies in the Frequency of Mental Disease. Free Press, Clencoe, Illinois, 1953.

*Helgason, T.:* Epidemiology of mental disorders in Iceland, Munksgaard, Copenhagen 1964.

*Hübertz, J. R.:* Et bidrag til Daarevæsenets statistik i Danmark. Dansk Ugeskrift, 2. række nr. 42, 43, 44, side 245—271, København 1843.

— Om Daarevæsenets indretning i Danmark. København 1843.

— De sindsyge i Danmark. Efter undersøgelse 1. juli 1847. Udgivet på Det statistiske Bureaus' bekostning. København 1851.

*Rasmussen, R. K.:* Om sindsyge på Færøerne i tiden 1820—1952. Bibliotek for læger, 145, 25—40, 1953.

— Om sindsyge og sindsygehospital på Færøerne. Ugeskrift for læger, 26, 1003—1044, 1953.

Statistisk Årbog 1978, Danmarks Statistik, København 1978.

*Strømgren, E.:* Psykiatri. Munksgaard 1976.

Sundhedsstyrelsens årsberetning 1950.

*Zachariasen, J.:* Medicinalberetning for årene 1932—37 for Færøernes amtslægekreds, Thorshavn.

## SUMMARY

Høgni Djurhuus & August G. Wang: Incidence of functional psychoses in Faroe Islands.

A comparison is made between first admissions to hospital of patients with functional psychoses in Faroe Islands and Denmark. Contrary to expectations the study shows significantly fewer first admissions in the Faroes, mainly due to fewer admissions of females over thirty years of age. It is discussed whether this is a genuine sign of lower incidence. Further investigations are planned.

The yearly incidence for the past few years was calculated at 0,45 ⁰/₀₀ in the Faroes and 0,66 ⁰/₀₀ in Denmark.